# **Næmingur** í bankanum

**BANKI**

Næmingar eru ein sjálvsagdur partur av umhvørvinum í Føroya Banka. Sum næmingur í bankanum fært tú eina holla og nútímans útbúgving í einum spennandi arbeiðsumhvørvi við góðum avbjóðingum.

Allan Smedemark, nýútbúgvin bankanæmingur í Føroya Banka á Tvøroyri greiðir frá hví hann valdi hesa útbúgving.

Hjálpa kundum at gera sínar møguleikar til veruleika

Eg valdi at fara í læru sum næmingur í Føroya Banka á sumri 2006. Sá í bløðunum at Føroya Banki søkti eftir næmingi í Suðuroy, og eftirsum eg áður hevði umhugsað hetta valdi eg at søkja. Eg havi altíð verið kundi í Føroya Banka, og havi altíð følt meg vælkomnan har sum kundi.

Mær dámdi væl tankan um at starvast í einari stóra fyritøku sum Føroya Banka og at vera við til at hjálpa kundunum við at realisera teirra dreymar, t.d. við at fíggja tá ein familja skal seta búgv.

Tað at hendan útbúgvingin kann brúkast til at útbúgva seg víðari, og at bankin leggur dent á at man ger tað, helt eg vera umráðandi, tá eg valdi hesa yrkisleið.

Mín fyrsta fatan av Føroya Banka var góð. Eg varð sera væl móttikin av starvsfeløgunum, sum eru dugnalig og hjálpsom.

## Holl útbúgving

Bankaútbúgvingin er skipað í ein praktiskan part og ein teoretiskan part. Tann praktiski fyrigongur úti á deildunum, men eisini skal man sum næmingur runt til onnur starvsøki at arbeiða í tíðarskeið, so sum Marknaðar-, Íløgu-, og Búskapardeildin. Eisini skulu vit til dótturfelag bankans, Trygd, at starvast í eini tíð, og hetta gevur okkum hollan kunnleika innan trygging.

## Mennandi avbjóðingar

Føroya Banki setir trivnaðin millum starvsfólkini høgt, og tað haldi eg er sera umráðandi. Umframt ókeypis frukt og kaffi verður skipað fyri skeiðum, útferðum og veitslum. Samanhaldið millum 'tey ungu' her í bankanum haldi eg vera gott. Her er lætt at kenna seg væl. Tað er eisini nakað serligt at arbeiða í einari fyritøku við fleiri enn 200 starvsfólkum, og nógvum ymsum virkisøkjum – tað eru altíð nýggj fólk, ein kann hitta, og avbjóðingarnar er mangar.

Mær hevur dámað ótrúliga væl at vera næmingur í Føroya Banka.



Eg havi ment meg nógv, og havi fingið nógvar royndir innan alt møguligt -meira enn eg hevði vónað! Hetta hevur verið ein lærurík tíð við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum.










